# Elsa Maria hjálparvenjari

**FIMLEIKUR Fimleikasambandið hevur gjørt avtalu við Elsu Mariu Bærentsen um, at hon skal vera hjálparvenjari hjá landsliðnum í estetiskum fimleiki**

Hilmar Jan Hansen



MEIRA BALLET

*Elsa Maria Bærentsen skal sum hjálparvenjari hjá landsliðnum í estetiskum fimleiki serliga styrkja um tann partin, ið hevur við balletdans at gera*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tá venjingarlega var á Eiði í heyst, vóru skeiðsleiðarar úr Russlandi við, sum tóku hópin út, ið skal manna landsliðið í estetiskum fimleiki. Ein av hesum var Olga Ponikarova, ið samstundis lovaði at taka sær av landsliðnum sum høvuðsvenjari.

Hon skal taka sær av seriuni og fylgja við, hvussu fimleikararnir mennast, og eisini hevur hon síðsta orðið at siga, tá fimleikararnir skulu takast út til liðið til HM-kappingina, sum verður í Týsklandi næsta ár.

Olga Ponikarova heldur føroysku fimleikararnar vera so mikið væl fyri, at teir kunnu vera millum 10 tey bestu liðini, men kortini er okkurt, ið resta í, áðrenn málið kann røkkast. Tað er í tí sambandi, at Fimleikasambandið nú hevur gjørt avtalu við Elsu Mariu Bærentsen um, at hon skal vera hjálparvenjari.

Millum annað skulu estetisku fimleikararnir gera meira við eitt nú balletdans, umframt at teir skulu fáa betri smidleika og betri kropsliga kondition.

Her hevur Elsa Maria nakað at geva, tí hon undirvísir í balletdansi, so tað verður serliga hesum partinum, hon skal taka sær av.

Føroyar vóru fyri fyrstu ferð við í einari HM-kappingin í 2005, tá kappingin var í Greve í Danmark, og síðani hevur føroyskt landslið verið við hvørja ferð.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Kappast á Tórsbreyt

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR Sunnudagin skipar Bragdið fyri opnum kappingum á Tórsbreyt í renning og longdarlopi**

Hilmar Jan Hansen

At tað eru opnar kappingar, gevur bæði gentum, dreingjum, kvinnum og monnum í øllum aldri møguleika at vera við. Sjálv kappingin byrjar sunnudagin klokkan 14, og tilmeldingin byrjar hálvan tíma áðrenn, klokkan 13.30.

Á skránni eru rennikappingar í bæði stutt-, mið- og langteinum, umframt kapping í longdarlopi. Øll kunnu vera við í longdarlopi, men annars kunnu børn, fødd áðrenn 2000, renna 60 og 100 metrar, meðan tey, sum eru fødd í 1999 ella áðrenn, kunnu renna 100, 200, 800 og 5000 metrar.

Fyri at fáa úrslitini skrásett neyv, samstundis sum øll kunnu royna seg ímóti teimum bestu, verður eltíðtøkuútgerðin hjá sambandinum fyri frælsan ítrótt, FÍF, brúkt til kappingarnar sunnudagin.

hilmarjan@sosialurin.fo



ESTETISK KAPPING

*Støkk, Flog, Ljósið og Havnar Fimleikafelag fara um vikuskiftið at kappast í estetiskum fimleiki í deildunum pinkur, smágentur, gentur, kvinnuunglingar og kvinnur*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Estetisk steypakapping

**FIMLEIKUR Seinna steypakappingin í estetiskum fimleiki verður í Runavík um vikuskiftið, tá feløg frá bæði Støkk, Flogi, Ljósinum og Havnar Fimleikafelag fara at kappast í fleiri deildum**

Hilmar Jan Hansen

Á hvørjum ári eru tvær steypakappingar í estetiskum fimleiki, og í morgin og sunnudagin verður tann seinna av teimum. Hesa ferð verður kappast í ítróttarhøllini í Runavík.

Í morgin klokkan 14 verður farið í gongd, og fyrra dagin eru tað gentur, kvinnuunglingar og kvinnur, ið standa fyri tørni, og sunnudagin sleppa so pinkur og smágentur framat.

Hesar steypakappingarnar eru skipaðar soleiðis, at trý tey fremstu liðini í hvørjari deild fáa heiðursmerki, og besta liðið í báðum steypakappingunum í hvørjari deild fær steyp til ognar. Tá kappingarnar hesa ferð eru av, verður talt saman og á tann hátt verður funnið fram til samlaðu vinnararnar.

Feløgini, sum eru við í kappingini í Runavík um vikuskiftið, eru Støkk, Flog, Ljósið og Havnar Fimleikafelag, og væntast kunnu fleiri sera spennandi kappingar, tí nógv av liðunum eru sera jøvn, so einki kann sigast at vera avgjørt frammanundan.

Fyrra steypakappingin var á Kambsdali vikuskiftið 15. og 16. januar, og tá vann Havnar Fimleikafelag hjá kvinnum, kvinnuunglingum, gentum og smágentum, meðan Støkk vann hjá pinkum.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Taptu aftur fyri finnum

**FÓTBÓLTUR Føroyska manslandsliðið í fótbólti spældi í gjár aftur ímóti HJK Helsinki, og enn eina ferð gjørdist úrslitið 3-1 til finska meistaraliðið**

Hilmar Jan Hansen

Hóast tey flestu av okkum halda Spania og sólskin vera tað sama, so hevur fótbóltslandsliðið gjørt sær aðrar royndir hesa vikuna. Mikudagin skuldi spælast ein venjingardystur ímóti Malaga, men tá regnaði av grimd, so ikki var spælandi seinnapartin, tá dysturin annars skuldi verið.

Liðið fekk vant, men mátti so í einari skjótari vend royna at finna sær annað mótstøðulið, so ein venjingardystur í staðin kundi spælast í gjár. Tað eydnaðist, tí finska meistaraliðið, HJK Helsinki, var við uppá at spæla ein dyst aftrat ímóti Føroyum.

Fyrra dystin teirra millum, ið var týsdagin, vann finska liðið 3-1, og tað gjørdist eisini úrslitið í seinna dystinum, sum var í gjár. Aftur hesa ferð komu finnarnir tíðliga á odda, tá Jarno Parikka gjørdi sær dælt av einum mistaki í føroysku verjuni og skoraði til 1-0.

Eftir málið fingu Føroyar yvirvág, men tað eydnaðist kortini ikki at skora fyrr enn eftir steðgin, tá Føroyar løgdu enn meira trýst á, og mestsum beinanvegin eydnaðist at javna, tá Hjalgrím Elttør stutt uttan fyri finska brotsteigin skjeyt eitt fríspark beinleiðis í málið. Tað gingu tó minni enn tveir minuttir, so hevði Cheyne Fowler aftur lagt HJK Helskinki framum.

Sum eitt kuriosum kann so nevnast, at triðja málið hjá finnunum fekk ein av teirra størstu legendum, 40 ára gamli Jari Litmanen, miðskeiðis í seinna hálvleiki. Fleiri mál komu ikki, og HJK Helsinki vann tí enn eina ferð 3-1, men sum skilst vóru finnarnir væl nøgdir við teir báðar dystirnar ímóti Føroyum – ikki bara fyri úrslitið, men eisini tí mótstøðan var hóskandi.

Brian Kerr hevur latið allar sleppa framat, tí í dystinum í gjár sluppu allir teir at spæla, sum sótu uttanfyri í fyrra dystinum ímóti finsku meistarunum.

hilmarjan@sosialurin.fo